# Sp/F Total eigur nú Skálk



*Feðgarnir báðir, Kári, høgru megin og Lars vinstrumegin. P/F Feðgar, sum Kári Müller er stjóri í, hevur átt klædnahandilin Skálk, frá byrjan, men tann 1. marts keypti Sp/F Total, sum sonur Kára, Lars, eigur, handilin burtur úr partafelagnum hjá pápanum, sum sostatt heilt hevur slept handilsyrkinum í Føroyum*

**Mynd: Álvur Haraldsen**

SVEINUR TRÓNDARSON

Fyri nøkrum mánaðum síðani boðaði Kári Müller frá, at hann læt handilin Feðgar í SMS aftur.

Hann varð vorðin troyttur av yrkinum og helt, at nú var tíð at gevast.

Skelti varð tikið niður og ikki so langa tíð aftaná, lat annar handil upp í gmlu hølunum hjá Feðgum.

Kortini slepti Kári ikki SMS heilt, tí felag hansara átti handilin Skálk, sum búleikast á loftinum beint omanfyri har Feðgar helt til áðrenn handilin lat aftur.

Men nú er eisini tað ein saga blot. Tann 1. marts seldi Kári soninum Lars tann handilin og við tí var seinasta klædnahandilin avviklaður.

P/F Feðgar hevði annars handlar í Havn, Fuglafirði og í Klaksvík, men teir eru seldir við árunum.

### Yngra ættarliðið

Tað er Sp/F Total, sum hevur keypt klædnahandilin Skálk, burtur úr P/F Feðgum.

Lars Müller, sum er einsamallur eigari av Sp/F Total er, sum vera mann, ikki ókendur í fakinum, tí felag hansara eigur ein handil av sama navnið - Total - í Klaksvík. Hesin handilin lat upp 29. september í fjør, og nú hálvt ár seinni er so tann næsti í røðini komin.

Lars Müller greiðir frá, at tey, síðani hann yvirtók handilin, hava gjørt nakrar broytingar, sum tey hildu vera neyðugar.

– V it hava bygt handilin eitt sindur um og tað eru vit stak væl nøgd við, greiðir hann frá.

Vørurnar í handlinum vera so at siga tær somu sum áðrenn.

– Vit fara at selja tey somu merkini, umframt at vit fáa onkur merki afturat. Ice Man og Dockers, sum er eitt merki hjá Levi´s, fara vit eisini at selja, sigur Lars.

Sum handilsmenn flest er hann ikki so tíðindafróður, hvussu tað gongur hjá honum at sleja, men hann sigur kortini at tað gongur hampuliga væl.

– Tað melur runt, sum tað skal, bæði í Klaksvík og her, sigur hann.

Handilin Skálkur er ein harra/dreingjahandil burturav, meðan Total í Klaksvík er eitt sindur øðrvísi, greiðir Lars frá.

– Har selja vit eisini klæðir til dámur og til børn og tað gongur fínt, sigur Lars.

# Innbrot og herverk

SVEINUR TRÓNDARSON

Sunnudagin fekk løgreglan í Havn fráboðan um, at innbrot hevði verið í pylsuvognin hjá Toru Tourist.

Pylsuvognurin stendur við Niels Finsensgøtu, beint við síðuna av skrivstovubygninginum hjá Toru Tourist.

Nær innbotið var framt, veit løgreglan ikki frá at siga, men ótangarnir hava vita hvat teir gjørdu, tí teir eru farnir niður í gjøgnum eitt vindeygað, sum er í takinum á pylsuvonginum.

Vakthavandi á støðini í Havn sigur, at eigararnir hava boðað frá, at 5 túsund krónur eru horvnar úr pylsuvogninum.

Sum støðan er í løtuni veit løgreglan ikki hvør hevur framt ógerðina, men teir kanna málið.

### Herverk í Vágbotni

Um seks-tíðina sunnumorgunin fekk løgreglan í Havn fráboðan um, at nakrir ótangar gingu og gjørdu seg inn á lyktapelarnar, sum standa fram við bátabrúgvunum í Vágsbotni yvir móti Skálatrøð.

– Teir gingu og sparkaðu inn móti pelunum, helst fyri at fáa perurnar at bresta, men tað eydnaðist ikki so væl hjá teimum, sigur vakthavandi.

Tað hevur eftir øllum at døma fingið øði í teir, tí ístaðin valdu ótangarnir at gera seg inn á nakrar bátar, sum liggja við bátabryggjurnar. Teir kvettu fanglínurnar á fimm bátum, sum tí lógu og sløgdust.

Vakthavandi á støðini sigur, at teir sendu ein bil á staðið, og dreingirnir fingu nøkur orð við sær á vegnum.

– Um so er, at onkur av báteigarunum meldar ógerðina, so taka vit í teir aftur, sigur vakthavandi

# Harðskapur í Klubbagarðinum

SVEINUR TRÓNDARSON

Løgreglan í Havn, hevur sum vanligt havt sítt at takst við um vikuskiftið.

Tað sær út til, at løgreglan ikki sleppur undan liggjandi gestum, sum ikki eru førir fyri at vinna upp hús og í so máta var júst farna vikuskiftið einki undantak.

Leygarnáttina gistu tveir, sunnunáttina tríggir og mánanáttina gisti ein.

Annars varð løgreglan kallað út til ein bardaga í Klubbagarðinum leygarnáttina.

Tveir menn vóru farnir komnir til ilnar og illa gekst hjá teimum at semjast. Tað endaði við, at tann eini reiggjaði hinum nevan frammaná, og so varð løgreglan boðsend.

Teir tosaðu við menninar báðar, og tann sum slóg kann væntað sær eina bót. Út frá frágreiðingini fer fútin at taka støðu til, um málið skal fyri rættin. Fer tað í rættin, kann maðurin verða revsaður við hefti.

# Ferðsluóhapp í Vági

SVEINUR TRÓNDARSON

Tað hevur verið púra friðarligt í Suðuroynni um vikuskiftið.

Løgreglan á Tvøroyri sigur, at einasta, sum teir høvdu at takast við var eitt lítið ferðsluóhapp, sum hendi í Vági, men tað var einki at skriva heim um, verður sagt av Tvøroyri

# Tvey óhapp og innbrot í bilar

SVEINUR TRÓNDARSON

Eins og á Tvøroyri sigur løgreglan í Eysturoynni, at teir hava havt eitt friðarligt vikuskifti.

Tvey smá ferðsluóhapp og innbrot í tveir bilar, var tað, sum breyt vikuskiftisfriðin hesaferð.

Fríggjadagin hendi eitt lítið ferðsluóhapp, tá ein bilur, kom í so nær einum parkeraðum bili.

Leygardagin mátti løgreglan til Fuglafjarðar ein túr, at tosa við ein bilførara, sum hevði bakka sær bilin út av vegnum.

Sama dag fekk løgreglan fráboðan um at brotið var inn í tveir bilar, sum stóðu parkeraðir í Fuglafirði.

Ikki tí, tjóvarnir hava gjørt sær dalt av, at bileigararnir hava kent seg á tryggari grund, tí bilarnir vóru ikki læstir, so lætt hevur verið hjá ótangunum at sleppa framat.

Av støðini í Runavík frætta vit, at tjóvarnir í báðum førum eru farnir avstað við stereoútgerðini í bilunum.

Eingin er tikin í sambandi við stuldurin.

# Fólk í góðum hýri

SVEINUR TRÓNDARSON

Tað er ikki oftari enn so, at tað er dansur bæði í Miðvági og í Sørvági sama vikuskiftið, men hetta vikuskiftið var eitt undantak í so máta. Flogbóltsdansur var í Miðvági í sambandi við Giljaneskappingina og »Aftur í 60-árini« var í Sørvági og av løgreglustøðini í Miðvági frætta vit, at alt gekk upp á stás.

– Tað yngra ættarliðið helt seg í Miðvági meðan tey sum eru eitt sindur eldri hildu til í Sørvági, og tað gekk sera friðarliga fyri seg. Fólk vóru í góðum hýri og tað var tað, tíbetur, sigur vakthavandi av flogvøllinum, har størsti parturin av teirra arbeiðsdegi verður brúktur.

Løgreglan í Miðvági hevur ábyrgdina av at taka ímóti ferðandi um flogvøllin og nú Atlantsflog er farið undir summarferðaætlanina hevur løgreglan fingið eitt sindur meira at takast við.

– Atlantsflog fór fyrsta túrin til Aberdeen sunnukvøldið og kom aftur fyrrapartin í gjár og tað merkir, at vit skulu vera her fyri at taka ímóti teimum, men tað er hugaligt arbeiði, sigur vakthavandi.

# Regnið heldur fólki innandura

SVEINUR TRÓNDARSON

Løgreglan í Klaksvík hevur havt enn eitt friðarligt vikuskiftið. Lítið fólk var í býnum og tað merkist á arbeiðsbyrðuni hjá løgregluni har norðuri.

– Einki tiltak var um vikuskiftið, og tað merkist væl. Tað skal sigast, at tað var keðiligt veður, tí tað oysti niður bæði fríggjakvøldið og leygarkvøldið. Og tá heldur fólk seg innandura, sigur vakthavandi á støðini í Klaksvík.

Fríggjadagin kom ein maður kortini á gátt. Hann var sligin av einum øðrum manni, sum hann hevði hitt í býnum. Teir vóru báðir druknir, skilst, og vóru komnir til ilnar um eitthvørt.



# Løgmaður ímóti umskipan av landsstýrinum

*Samgongulimir hava um vikuskiftið umrøtt at gera flytingar millum landsstýrissessirnar. Men løgmaður vil ikki hoyra talan um hetta*



JOHN JOHANNESSEN

Landsstýrisfundurin í gjár gjørdist óvanliga drúgvur. Stutt undan evstamarki í gjár høvdu vit Anfinn Kallsberg, løgmann, í telefonini. Hann segði, at tað vóru nógv mál á skránni, men hann váttaði samstundis, at tað var spurningurin um landsstýrissessin hjá Signari á Brúnni, sum var farin við mestu tíðini.

Talan tykist meiri ella minni at vera um eina politiska gølu, eftir at løgtingsgrannskoðararnir og landsgrannskoðarin hava skorið út í papp, at landsstýrismaðurin í mentamálum breyt stýrisskipanarlógina, tá hann játtaði sjónvarpinum pengar, uttan at málið var samtykt í løgtinginum ella í fíggjarnevndini.

Á landsstýrisfundinum í gjár fekk Signar á Brúnni høvi at leggja síni sjónarmið á borðið um ta politisku føluna. Signar møtti á fundi við løgfrøðinginum og øðrum umboðum fyri mentamálastýrið, men sum sagt, var eingin avgerð tikin, tá blaðið fór til prentingar.

Sambært stýrisskipanarlógini er tað løgmaður, sum hevur eftirlit við arbeiðnum hjá landsstýrismonnunum, og formliga er tað løgmaður, sum setur landsstýrismenn og loysir teir úr starvi.

Men Anfinn Kallsberg sigur, at hetta fyribils er eitt mál hjá Tjóðveldisflokkinum.

### Avgerðin er tikin

Tingmanningin hjá Tjóðveldisflokkinum hevur í vikuskiftinum viðgjørt frágreiðingina hjá løgtingsgrannskoðarunum og harvið framtíðina hjá Signari á Brúnni í landsstýrinum. Frá álítandi keldum innarliga í flokkinum hava vit fingið at vita, at støðan í flokkinum er, at Signar á Brúnni má fara frá, men avgerðin var ikki almannakunngjørd seinnapartin í gjár.

Aðalstjórnin í Tjóðveldisflokkinum er kallað til fundar í dag. Í aðalstjórnini eru umboð fyri øll valdømini, men vit hava skilt, at tað er bara tingmanningin, sum hevur heimildina at gera av, hvør skal vera landsstýrismaður.

Spurningurin um hvør skal koma í landsstýrið fyri Signar á Brúnni hevur verið viðgjørdur í vikuskiftinum. Viðgerðin hevur ikki bara verið í Tjóðveldisflokkinum, men eisini í Fólkaflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum, sum eru í samgongu við Tjóðveldisflokkin.

Orsøkin til at samgonguflokkarnir eisini hava verið við í viðgerðini er, at tað millum samgongufólk hevur verið tosað um at gera fleiri broytingar í landsstýrinum.

Men Anfinn Kallsberg løgmaður avsannar avgjørdur, at talan er um nakra veruleikakenda viðgerð:

– Eg kenni einki til, at aðrar broytingar skulu gerast í landsstýrinum enn tær, sum møguliga verða neyðugar, og eg vil fegin undirstrika, at hetta verður ikki gjørt so leingi, sum eg eri løgmaður. So verður tað heldur soleiðis, at eg fari úr mínum sessi, segði Anfinn Kallsberg seinnapartin í gjár, meðan hann sat á landsstýrisfundi.

### Orsøkin

Politiska tosið um vikuskiftið hevur annars verið, at høvið var kærkomið at gera broytingar í landsstýrismanningini.

Veljarakanningin, sum varð kunngjørd fyri stuttum vísti, at Sjálvstýrisflokkurin og serliga Fólkaflokkurin hava minni undirtøku millum veljararnar nú, enn teir høvdu á valinum fyri knøppum tveimum árum síðani.

Tjóðveldisflokkurin hevur somu undirtøku, sum hann hevði tá, men tá Tjóðveldisflokkurin eftir lemjandi kritikkin frá løgtingsgrannskoðarunum og landsgrannskoðaranum heldur seg vera noyddan at skifta Signar á Brúnni út, eru tað fleiri, sum halda, at stundin er komin hjá øllum flokkunum at skifta eitt sindur út. Ella, sum onkur sagt, at styrkja liðið, sum skal føra samgonguna ígjøgnum samráðingarnar við Danmark, ígjøgnum fólkaatkvøðuna og fram móti løgtingsvalinum, sum í seinasta lagið verður um tvey ár.

### Møguleikarnir

Eingin av samgongulimunum, sum vit hava tosað við, vil úttala seg alment um hesa ætlan. Summir politikarar siga, at tað er rætt, at tað verður tosað um hetta, og aðrir siga, at teir kenna einki til ætlanina. Tað er greitt, at eingir fundir hava verið í fólkaflokkinum og sjálvstýrisflokkinum um henda spurningin.

Millum møguleikarnir er tann mest upplagdi, at ein nýggjur tjóðveldismaður kemur í landsstýrið fyri Signar á Brúnni. Tað er ikki avgjørt enn, hvør tað verður. Men tó hevur verið tosað um formannin í aðalstjórn floksins, Óla Holm úr Vági.

Áðrenn nýggjur landsstýrismaður verður settur, skal Høgni Hoydal møguliga taka sær av hesum málsøkinum.

Ein annar møguleiki er, at Tjóðveldisflokkurin skal yvirtaka heilsumálini og almennamálini frá Helenu Dam á Neytstabø. Helena skal so flytast á oljuna, og Eyðun Elttør skal loysast úr starvinum sum landsstýrismaður. So skal Sjálvstýrisflokkurin finna ein nýggjan landsstýrismann í skúlamálum.

Ein triðji møguleiki er ein, har Fólkaflokkurin eisini verður blandaður uppí. Møguleikin er, at Finnbogi Arge verður fluttur frá vinnumálum og til oljumálini. Tjóðveldisflokkurin skal so yvirtaka vinnumálini, og sjálvstýrisflokkurin skal yvirtaka skúlamálini.

Tað hevur verið nevnt, at Torbjørn Jacobsen, ið missir løgtingssessin, tá Signar á Brúnni fer úr landsstýrinum, skal gerast landsstýrismaður í vinnumálum.

Skal henda síðsta kabalin ganga upp, skal Sjálvstýrisflokkurin finna ein nýggjan landsstýrismann í skúlamálum. Gitingarnar siga, at so verður tað ein, sum ikki er limur í løgtinginum.

Í óalmenna politiska orðaskiftinum verður hesin síðsti møguleikin ikki mettur at vera upplagdur, tí hann gevur Sjálvstýrisflokkinum tveir tungar landsstýrissessir. Tá sjálvstýrisflokkurin fekk tveir landsstýrismenn var tað júst tí at oljumálini tá vórðu mett at vera ein lítil landsstýrissessur.


Opið hús

hjá

Kaj Andreasen & Co

*Nú farið er inní eitt nýtt áratúsund, er tíðin komin til framvísing av nýggjari vøru. Í samband við vitjan frá Hünnebeck frá 2. til 8. apríl, verður opið hús, har møguleiki verður at síggja:*

- *Bosta stillads*
- *Opal Alu. stillads*
- *Rasto forskalling*
- *Tekko forskalling*
- *umframt annað*

*Væntandi verður eisini møguleiki fyri at síggja eina 40“ innrættaða bingju við Bosta - stillads klár til flutning frá byggiplássi til byggipláss.*

*Komið tískil til*

***Opið hús 6. apríl 2000***

***kl. 13.00 – 19.00 hjá***
***Kaj Andreasen & Co á Sandvíkarhjalla.***
***Okkurt verður til matna.***

*Brian Nissen frá Hünnebeck Danmark er at hitta frá 2. til 8. apríl á Hotel Hafnia,*

*tlf. 313233 ella á biltelefon nr. +45 40567547*

*Vit síggjast*

Kaj Andreasen & Co

Hünnebeck Danmark A/S